ETISKA RÁÐIÐ

# Hoyringssvar til uppskot til Løgtingslóg um fosturtøku (Fosturtøkulógin)

Etiska ráðið takkar fyri møguleikan at koma við viðmerkingum til uppskot til Løgtingslóg um fosturtøku (Fosturtøkulógin). Í hesum skrivi viðger Etiska ráðið fyrimunir og vansar við uppskotinum, eins væl og lýsir nakrar prinsipiellar spurningar, ið lógaruppskotið reisir.

Summir ráðslimir undrast yvir, at lógaruppskotið líkist danskari lóggávu so nógv. Tey meta, at tað hevði verið ynskiligt, at lóggávan heldur viðgjørdi føroyska siðvenju og fatan av fosturtøku, og lóggávan harvið tók útgangsstøði í føroyska samfelagnum, heldur enn tí danska.

Sum heild er tað greitt, at verandi lóggáva hevur nakrar óhepnar ásetingar og er merkt av tíðini, hon er frá. Ásetingin um, at illgruni um epilepsi er ein haldgóð orsøk til fosturtøku, er dømi um hetta, havandi í huga, at ein ikki kann staðfesta epilepsi hjá einum fostri, og at viðgerðin fyri epilepsi er betrað munandi farnu áratíggjuni. Óansæð um ein metir, at fosturtøka er rætt ella ikki, so er tað óheppið, at ymiskir kommunulæknar tulka lógina ymiskt. Tað er somuleiðis óheppið, at galdandi siðvenja og lógin ikki samsvara, og ein kann tí seta spurnartekin við, um tað er siðvenjan ella lógin, sum skal broytast.

Harumframt er tað ivasamt, hvørt tað er rætt, at ein áleggur læknum einsamallur at hava so stóra ábyrgd, tá um ræður hvørt ein skal loyva fosturtøku ella ikki. Tó at læknar kunnu meta um læknafrøðiligu viðurskiftini, so er ein lækni ikki lógkønur, og tað er óheppið, at ein lækni bæði skal vera í eini støðu, har hann skal hava eitt opið samskifti við fólk, ið er bygt á álit, og samstundis hevur so stóra ávirkan á, hvørt eitt ynski um fosturtøku verður gingið á møti ella ikki. Noktar læknin at ganga ynskinum á møti, so kann hetta hava stórar avleiðingar fyri, hvørt kvinnan seinni hevur álit á læknanum, ið kann hava neiligar avleiðingar við sær seinni. Ein kann eisini siga, at tað at føroyska samfelagið er so lítið, og tað er vanligt at fólk hittast í ymiskum samanhangum, ger, at tað kann vera eyka torført hjá læknum í Føroyum at sita við hesi ábyrgd. Ein kann tó eisini argumentera fyri, at læknar eru vanir við, at taka avgerðir um viðgerðir, og tískil eru vanir við at fyrihalda seg objektivt.

Tað er harumframt lítið at ivast í, at ein mismunur er í tí, at sum støðan er, so kunnu kvinnur, ið eru fíggjarliga væl fyri, velja at fara uttanlands at taka fosturtøku, meðan kvinnur, ið eru verri fyri fíggjarliga, ikki hava hendan møguleikan. Hesin mismunur noyðist ikki at merkja, at ein harvið eigur at loyva øllum fosturtøkum upp til 12 viku, men tað er eitt ávíst órættvísi í tí, at er ein fíggjarliga nóg væl fyri, so noyðist ein ikki at fylgja galdandi lóggávu.

Sostatt er tað greitt, at tað eru fleiri viðurskifti í galdandi lóggávu, sum ein eigur at umhugsa at broyta.

Harumframt eru tað summir ráðslimir, sum ynskja, at ein tekur upp arbeiði við eini aðrari lóg, har ein tryggjar samvitskufrælsi hjá heilsustarvsfólkum og øðrum, at tey ikki skulu standa fyri viðgerðum, sum t.d. eru í andsøgn við samvitsku teirra. Aðrir ráðslimir meta tó ikki, at hetta er neyðugt ella gott. Summir ráðslimir ynskja eisini, at ein hyggur nærri at treytunum tá um ræður ættleiðing, og hvørt ein kann gera nakað fyri at ættleiðing kann gerast eitt lættari alternativ til fosturtøku.

## Loyvi til fosturtøku ella ikki?

Úr einum etiskum sjónarhorni, er tað torført at koma til eina endaliga niðurstøðu um, hvørt ein eigur at hava loyvi til fosturtøku, ella fosturtøka einans skal vera loyvd í serligum umstøðum, so sum tá tað stendur um lív, fostrið neyvan er lívført, ella talan er um neyðtøku ella blóðskemd, ella ein undir ongum umstøðum eigur at heimila fosturtøku.

Øll sjónarhornini seta ógvuliga ymisk atlit sum grundarlag, og tí er umráðandi at kanna hvørji atlit og grundgevingar eru sum grunda tey ymsu sjónarhornini, og hvussu hesi verða vigað upp móti hvørjum øðrum. Tey atlit, sum vanliga gera seg galdandi eru, rættindini hjá kvinnuni, rættindini hjá fostrinum, viðurskiftini hjá heilsustarvsfólkunum, og samfelagsviðurskifti so sum gransking innan heilsuøki, eitt nú fosturdiagnostik, barnloysi (royndarglasgitnaður – reagensglasbefrugtning) og rættindi hjá borgarum bæði alment og meira serstakt. Metir ein, at loyvi til fosturtøku, serliga uttan treytir, er skeivt, so kann tað vera tí, ein metir, at fostrið hevur somu grundleggjandi rættindi til lív sum persónar, ið longu eru føddir. Metir ein hinvegin, at ein skal loyva fosturtøku, so kann tað vera, tí ein metir, at kvinnan og hennara rættur til ræði yvir egnan kropp er tað, sum ein metur hevur størstan týdning. Tað er helst bara, tá heilsa og lív hjá kvinnuni eru í vanda, ella fostrið ikki er lívført, at hesi atlit kunnu sameinast. Sjálvt tá talan er um blóðskemd og neyðtøku, so kann ein argumentera fyri, at tað ikki er fostrið, sum hevur skyldina í hesum – tó at tey flestu vanliga siga, at hetta setur kvinnuna í eina so mikið ringa støðu, at her má ein taka atlitini til hana framum.

Tó at ein setur sjónarhornini upp ímóti hvør øðrum á ein slíkan hátt, at eina síðan tekur atlit til fostrið og hin tekur atlit til kvinnuna, so er eisini ein triðja og meira gradualistisk fatan. So hvørt sum fostrið mennir seg, so vigar rætturin hjá fostrinum til lív stigvíst meira. So hvørt sum fostrið mennist, so gerast krøvini til, nær ein kann fáa fosturtøku, alt strangari, og atlitini flyta seg stigvíst frá, at ein leggur størri dent á at verja frælsa valið hjá kvinnuni, til at ein leggur størri dent á, at verja fostrið, forútsæð at tað er lívført og at lívið hjá mammuni ikki er í vanda. Harumframt viga atlitini til heilsustarvsfólkini eisini meira, tess longri fostrið er komið í menning síni.

Úr etiskum sjónarhorni er tað torført at meta um, hvørt tað er rættast at leggja dent á rættindini hjá kvinnuni ella hjá fostrinum. Á teirri eini síðuni kann ein siga sum so, at tað er rætt, at tað vanliga er semja um, at ein eigur at verja tey, sum eru veik og verjuleys. Tað er somuleiðis rætt, at øll menniskju hava rætt til lív og hava rætt til vernd. Er fatanin tann, sum tann eini bólkurin er sannførdur um, at lívið byrjar við gitnaði, so er tað torført at finna argument fyri, at fostur ikki hava rætt til lív og vernd.

Hinvegin eru fólk í hinum bólkinum sannførd um, at tað er skeivt at tvinga fólk til at gera eitthvørt við kroppi teirra, sum tey ikki ynskja at gera. Ynskir ein kvinna ikki at vera við barn, so er tað torført at argumentera fyri, at tað í sjálvum sær er rætt at tvinga hesa kvinnuna til at vera við barn, tí ein ger seg inn á sjálvsavgerðarrættin og persónliga frælsið hjá kvinnuni. Ivamálini blíva ikki aktuel, uttan so at ein sær fostrið sum ein einstakling, ið eisini hevur rættindi. Eitt vanligt argument er, at kvinnan bara kundi latið vera við at havt samlegu ella kundi vart seg betri, men tað argumentið stendur ikki altíð á so sterkum grundarlagi. Eingin vernd – sjálvt ikki sterilisatión – er 100% trygg, øll eru ikki nóg væl ílatin tá um ræður vitan um kynslig sambond, og summi vildu eisini sagt, at drívmegin at hava samlegu kann vera so sterk, at tað er torført hjá fólki at hugsa um allar avleiðingarnar tá tey eru í støðuni. Serliga um hetta síðsta, kann ósemja vera um sum orsøk til fosturtøku, men summi argumentera fyri, at tað at ein er óansin eina lítla løtu, ikki eigur at mynda restina av lívinum hjá kvinnuni. Harumframt er tað eisini ein sannroynd, at tað kann vera ein ógvuliga tung byrða og hava sera stóra ávirkan á lívsvánirnar hjá einum persóni, um hesin persónurin gerst foreldur, ella fær eitt barn afturat. Hóast hetta, kann sama argument verða galdandi fyri fostrið, um ein metir, at fostrið er menniskja frá gitnaði, og ikki eigur at verða revsað av at foreldrini vóru óansin eina løtu.

Sum við øðrum etiskum argumentum, kann ein eisini seta spurningar til, hvørt sjálvsavgerðarrætturin um kroppin er einasta atliti, í mun til sjálvsavgerðarrætt. Ein kann finna semjur um, at sjálvsavgerðarrætturin hjá øllum menniskjum er nakað heilt serstakt og eigur at verjast í móti ágangi. Frælsi er altíð við ábyrgd. Tey, sum helst vilja avmarka loyvi til fosturtøku, vildu sagt, at fostrið, sum kvinnan berur, er ein sjálvstøðug vera, heldur enn ein lívfrøðiligur partur av kvinnuni sjálvari. Fostrið hevur sítt egna DNA. Sigur ein, at kvinnan hevur fullkomnan ræðisrætt yvir egnum kroppi, so at hon ikki bara avgerð hvat hendur, men eisini hvat fer inn í kroppin hjá sær, hví loyvir ein so ikki fosturtøku heilt fram til føðing? Er ræðisrætturin hjá kvinnuni skerdur í ávísum førum, so blívur tað eisini út frá hesum sjónarhorninum torført at staðfesta, hvar markið gongur.

Ein spurningur, sum av og á eisini verður reistur, er, hvørt tað er gott fyri kvinnuna ella ikki, at tað er hon, sum situr við endaligu ábyrgdini av, hvørt ein fosturtøka verður framd ella ikki. Ein kann siga sum so, at er ein lækni við í avgerðini, so kann tað geva kvinnuni eina kenslu av, at avgerðin er røtt, og at ábyrgdin liggur á fleiri herðum. Tí kann ein argumentera fyri, at tað er minni sálarliga hart fyri kvinnuna. Hinvegin kann ein

eisini argumentera, at tað er ein eykað byrða fyri kvinnuna, at hon ikki sjálv sleppur at taka avgerðina. Tað at vita at onnur hava ræði yvir lagnu hennara, kann leggja eitt eykað trýst á, og óvissan kvinnan er í, og kenslan av, at hon skal dømast, kann eisini leggja eitt eykað sálarligt trýst á. Ein kann eisini argumentera fyri, at tað, at kvinnan bara fær fosturtøku, um læknin metir tað er rætt, kann gera, at ein leggur ábyrgdina frá sær, og hetta tí økir sannlíkindini fyri, at fosturtøkan verður framd. Sat kvinnan sjálv við avgerðin, so hevði hon møguliga følt seg undir minni trýsti, og komið til teirri niðurstøðu, at hon yngsti barnið.

Eitt annað argument, sum bæði tey, ið vilja loyva fosturtøku, og tey, sum eru ímóti, ofta koma inn á, er hvørt antin meira frí ella restriktiv fosturtøkulóggáva kann føra til eina glíðibreyt – altso, at tað at ein fyrst ger eina ávísa broyting í fosturtøkulógini hevur við sær, at hendan broytingin førir til aðrar (neiligar) broytingar seinni. Tey, ið ynskja at loyva fosturtøku, kunnu spyrja, hvat tað ger við fatanina av sjálvræði hjá kvinnuni, um fatanin er, at kvinnur skulu tvingast at føða eitt barn, ið tær ikki ynskja, og um kvinnan harvið verður tvungin til at vera í einum kynsleikluti, har hon missur tey rættindi, ið kvinnur hava fingið síðani 19. øld. Hetta argumentið kann førast heilt út til, hvørt ein restriktiv lóggáva og tann kvinnusjón hon umboðar, kann føra til, at kvinnur verða tvungnar til at vera heima, taka sær av børnum, og yvirhøvur føða so nógv børn sum gjørligt, og at glíðibreytin endar við, at ein eisini flytur seg inn á at avmarka rættin til fyribyrging.

Á hini síðuni kann ein siga sum so, at í og við at tað ikki ber til at staðfesta við vissu, nær eitt fostur hevur rættin til lív, hvat forðar so glíðibreytini í at flyta seg heilt fram til føðing? Um fostur kunnu veljast frá, tí at okkurt er galið við teimum, hvat forðar so fyri, at ein fyrr ella seinni endar í eini støðu, har ein kann velja fostur til og frá alt eftir, hvussu góðar ílegur tey hava, hvørja útsjónd ein kann rokna við at tey fáa, hvussu klók tey verða og so framvegis? Summi siga enntá sum so, at um ein kann velja óynskt fostur frá, leiðir tað so ikki eisini til, at tá lívsgóðskan hjá fólki verður ov ring ella tey ikki longur geva nakað búskaparligt íkast til samfelagið, kann ein so ikki eisini velja tey fólkini frá?

Hetta er í báðum førum argument, sum flyta seg rættiliga langt. Skal ein døma út frá gongdini flestu staðni í vesturheiminum, so verður eitt politiskt mótrák, tá ein flytur seg ov langt út á tann eina veingin, og tí er tað ósannlíkt, at tað verður vanligt, at ein flytur seg langt út á annan veingin – tó at tað eru dømi um støð, ið lutvíst hava flutt seg út á annan pólin ella hin.

Alt í alt er tað tískil torført at ímynda sær eina støðu, har ein fær øll samd um fosturtøkumálið, antin fyri ella ímóti. Svarið broytist alt eftir hvørjar fortreytir ein setur, og hvørji virði ein sigur eiga at viga tyngst. Var tað t.d. semja um, at fostrið hevur sama virði sum eitt menniskja frá gitnaði, so hevði tað styrkt argumentini hjá teimum, sum eru ímóti fosturtøku. Var tað hinvegin semja um, at eitt fostur er so mikið lítið ment, at tað ikki hevur sama virði sum eitt menniskja, so hevði tað styrkt støðuna hjá teimum, ið eru fyri fosturtøku.

Semja er um hvørga av støðunum. Tað virði, sum eitt fostur hevur, vil vera knýtt at eini subjektivari fatan av virðum, ið samfeløg ella bólkar blíva samd um, heldur enn eini objektivari meting, ið báðir partar eru samdir um.

## Viðmerkingar til einstøku lógargreinirnar

Í mun til **§ 1 í lógaruppskotinum,** so er tað torført at síggja, hví markið fyri fosturtøku er sett til júst 12 vikur, ið er ein broyting í mun til verandi lóggávu, men samsvarar við tað, sum er praktiserað. Hetta endurspeglar helst, at um ein er av teirri fatan, at eitt fostur ikki hevur sama virði sum eitt menniskja frá teirri løtu, tá eggið er gitið, so er tað torført at siga júst nær, ein kemur til hetta markið. Fostrið mennist áhaldandi, og tað sama er støðan eftir, at barnið er føtt. Eitt hampiliga greitt mark, ið tó flytur seg so hvørt læknavísindin mennist, er tá fostrið kann yvirliva uttan hjálp frá mammuni. Summi vildu argumentera fyri, at hetta hevði verið eitt meira natúrligt mark. Hinvegin eru eisini onnur mørk, ein kann hava, so sum eginleikin at føla pínu, menning av heilanum, hjartasláttur og tílíkt. Tó er torført at meta um júst, hvat av hesum mørkum hevði verið rættari at brúkt enn onnur – helst júst tí at markið endurspeglar eina subjektiva fatan av, nær fostrið flytur seg til at hava størri virði, og at tað neyvan ber til at hava eina felags meting av hesum. Tó hevði tað verið ynskiligt, um ein í viðmerkingunum gjørdi eina roynd at argumentera betri fyri, hví markið júst skal vera 12 vikur, heldur enn t.d. 8, 14 ella 17 vikur.

Í mun til **§ 3 5) í lógaruppskotinum** kann ein seta spurnartekin við, hvørt tað er rætt at loyva fosturtøkum av sosialum ávum. Á teirri eini síðuni kann ein siga sum so, at tá talan er um sosialar orsakir til, at ein kvinna ikki sær seg føra fyri at fáa (enn) eitt barn, so er hetta nakað, ein eigur at kunna loysa. Ein kann loysa tað við betri almennum skipanum, tryggja atgongd til góðan búskap, veita sálarligan stuðul og so framvegis. Summi vildu tí spurt, um tað ikki heldur er har, ein skal brúka orkuna og tryggja, at barnið og mamma tess kunnu fáa eitt gott lív heldur enn at siga, at loysnin er, at barnið ongantíð verður borið í heim.

Hinvegin kann ein eisini siga sum so, at var tað so lætt at tryggja, at øll høvdu nóg góðar umstøður til at tey mettu, at tey vóru før fyri at taka sær av einum barni, so høvdu vit nokk longu havt tær tænasturnar og tilboðini nú. Spurningurin er tí, hvussu realistiskt tað er at altíð tryggja, at fólk fáa hjálpina, tey hava tørv á, og um tað, at ein heldur eigur at tryggja, at hjálpin er nóg góð er eitt argument fyri, at ein ikki loyvir fosturtøku av sosialum ávum. Er ein ivasamur í mun til argumentið, so kundi ein sagt sum so, at arbeiðir ein fyri, at sosialar skipanir og tænastur verða so góðar, at fosturtøka av sosialum ávum ikki gerst neyðug, so verða loyvi til fosturtøkur ikki givnar av teirri orsøk longur, tá ein røkkur málinum. Hinvegin kann ein eisini

siga sum so, at tað, at lívið hjá mammuni gerst meira avbjóðandi, er ikki ein nóg góð orsøk til, at ein loyvir fosturtøku – serliga ikki um tað almenna veitir ta hjálp, tað kann.

**§ 5 í lógaruppskotinum** hevur nakrar manglar, ið kunnu hava óhepnar avleiðingar við sær. Her er serliga talan um, at viðmerkingarnar eru heldur ógreiðar. Tann parturin verður viðgjørdur nærri seinni í hoyringsskrivinum.

Tá um ræður **§ 7 í lógaruppskotinum**, so kann ein bæði argumentera fyri, at tað er rætt, at tað einans er eitt tilboð um ráðgeving ein fær, og siga sum so, at ein eigur at seta fram krav um, at kvinnur skulu fáa ráðgeving, áðrenn fosturtøkan kann fremjast. Leggur ein stóran dent á, at einstaklingurin hevur sjálvræði, og at hvør einstøk kvinna veit best, hvørt fosturtøka er rætta valið ella ikki, so er tað rætt, at tilboðið um ráðgeving einans er eitt tilboð. Er kvinnan 100% vís í, hvørt hon skal velja fosturtøku ella ikki, so er eingin orsøk at fáa ráðgeving. Hinvegin kann ein eisini siga sum so, at kravd ráðgeving er góð fyri einstøku kvinnuna. Hon er sannlíkt í eini støðu, sum er merkt av sterkum kenslum, tað er sannlíkt, at har bæði eru argument fyri og ímóti fosturtøku, sum hon ikki hevur hugsað um, og tað, at ein hevur møguleikan at tosa við ein serfrøðing um støðuna, økir alt annað líka fyri, at ein ikki tekur eina avgerð, sum ein seinni angrar. Viðmerkingarnar til lógina staðfesta eisini, at ein eigur at minka sum mest um fosturtøku. Nakrir ráðslimir vísa á, at tá kann kravd ráðgevingin eisini vera ein háttur at greiða frá, hvørjar møguleikar kvinnan hevur at fáa hjálp og stuðul, ið ger tað lættari hjá henni at taka sær av einum møguligum barni, og harvið minka um talið av fosturtøkum.

**§ 9 í lógaruppskotinum** hevur fleiri etisk ivamál við sær. Á teirri eini síðuni kann ein spyrja, hvørt tað yvirhøvur er rætt at lata upp fyri, at ungar kvinnur ella gentur, sum ikki enn eru myndugar, fáa møguleikan at leypa foreldrini um, tá um ræður eina so stóra avgerð. Foreldrini eru verjarnir hjá børnunum, inntil tey eru 18 ára gomul, og av tí sama eiga foreldrini at kunnast og at vera við í avgerðini, tá børn teirra eru í eini so svárari støðu, at tey umhugsa fosturtøku. Hetta hevur bæði prinsipiellan týdning í mun til rættindini hjá foreldrum, men eisini týdning í mun til at ein tryggjar, at foreldrini kunnu stuðla, hjálpa og vegleiða børnum sínum. Tó eru tað neyvan nógv, sum argumentera fyri, at foreldrini eiga at geva samtykki, tá talan er um blóðskemd, ella tá talan er um foreldur, har vandi er fyri, at tey kunnu gerast sálarliga ella kropsliga harðlig. Tó kann ein ivast í, hvussu ein skal meta um, nær hetta seinna er støðan, uttan so at barnaverndin ella løgreglan hava staðfest tann vandan. Sum heild kann ein sakna í lógaruppskotinum, at tað er greiðari, júst hvørji punkt skulu uppfyllast fyri, at ein fær undantak frá, at foreldrini skulu vera við í avgerðini.

Hinvegin kann ein eisini seta spurnartekin við, hví foreldrini skulu blandast uppí, vil unga kvinnan ikki tað. Hevur hon eitt so mikið gott samband við foreldrini, at tey kunnu stuðla, hjálpa og vegleiða henni, so er tað

ósannlíkt, at hon ikki biður tey um hjálp óansæð. Spurningurin er eisini, hvussu væl tað hongur saman, at kvinnur undir 18 ár, sum eru giftar, sleppa undan at foreldrini eru í myndini, um argumentatiónin er, at kvinnur undir 18 ár ikki eru nóg búnar at taka avgerð sjálvar. Meira grundleggjandi kann ein eisini spyrja, hví kvinnur, sum eru 15 – 17 ára gamlar, sleppa at gera av sjálvar, um tær hava samlegu ella ikki, um tær ikki eru nóg búnar til at taka avgerð um, hvørt tær skulu taka fosturtøku ella ikki, um tær gerast við barn. Alt annað líka er altíð ein vandi fyri, at ein kvinna, ið er før fyri at gerast við barn, gerst við barn, tá hon hevur samlegu við einum manni. Fólk, ið eru 15 – 17 ára gomul eru somuleiðis revsingarbær, sambært løgtingslóg um revsing. Ein kann seta spurnartekin við, hvørt tað er rætt, at 15 ára gomul eru nóg búgvin til, at tey kunnu fongslast, men ikki nóg búgvin til at taka avgerð um fosturtøku. Somuleiðis geva 15 – 17 ára gomul sjálvi samtykki til hvørja sjúkuviðgerð tey kunnu fáa, og so verða foreldrini kunnaði um hetta. Ein kann eisini undrast um, hvørt tað hongur saman, at tá um ræður pápan at fostrinum, so er tað "*í andsøgn við rættin hjá kvinnuni til sjálv at taka avgerðina*", at hann er við í avgerðini (tó at tað er natúrligt, sambært viðmerkingunum, at hann er við, um parið er saman), men at tað skal lóggevast, at foreldrini skulu samtykkja, tá talan er um kvinnu 15 – 17 ára gomul. Spurningurin er eisini hvat ein ger, um foreldrini at ungu kvinnuni eru ósamd um, hvørt ein skal loyva fosturtøku ella ikki.

Tá um ræður børn, sum eru yngri enn 15 ár, so gerst tað tó meira torført at argumentera fyri, at tey púra sjálvstøðugt eiga at sita við avgerðini.

Tað er gott, at **§ 12 í lógaruppskotinum** gevur møguleikan at fáa ráðgeving frá viðkomandi serlækna og felagsskapum, um vandi er fyri, at fostrið ber álvarsamt brek ella álvarsama sjúku. Hetta ger tað væl lættari at taka avgerð á upplýstum grundarlagi. Ber ein ikki brek ella hevur álvarsama kroniska sjúku (ella hevur onkran sera nær at sær, ið er í teirri støðuni), so er tað ógvuliga torført at seta seg inn í, hvussu tað er at liva við teimum avbjóðingunum og avmarkingunum, ið kunnu fylgja við tí. Tó er tað týdningarmikið, at ein roynir at tryggja sær, at felagsskapirnir, ið fólk kunnu venda sær til, verða ílatnir til at veita óhefta og dygdargóða ráðgeving. Fleiri av felagsskapunum, sum talan kann verða um, at fólk venda sær til, hava ikki lønt starvsfólk, og tí kann tað vera meira tilvildarligt, hvør er forfólk, og hvørt hesi hava royndir í at veita slíka ráðgeving. Ein kann neyvan krevja av umboðunum frá felagsskapunum – óansæð um tey eru sett í starv ella vald í ein sess – at tað at duga væl at ráðgeva fólki, er ein fortreyt fyri at fáa starv ella sess í felagsskapinum. Tí er spurningurin, um ein ikki eigur at hava eina skipan, ið eitt nú veitir undirvísing og ráð um slíkar samrøður til umboð fyri felagsskapirnar.

Tá um ræður samráðið í **§ 14 í løgtingslógini**, so kann samansetingin í ráðnum helst verða nakað betri enn tað, sum lógaruppskotið sigur. Ein løgfrøðingur og ein sosialráðgevi hava ikki somu førleikar at tulka lóg – og fevna um sera ymisk sjónarhorn í eini tílíkari viðgerð. Tað rættasta hevði helst verið, at ein løgfrøðingur

altíð skal vera við. Tað er somuleiðis undrunarsamt, at ein velur at hava tveir læknar við í samráðnum. Hyggur ein at lýsingini av tí, sum ein lækni við sergrein í sosialmedisin skal fevna um í samráðnum, sambært viðmerkingunum til lógaruppskotið, so er tað spurningurin, um ein sosialráðgevi ella ein sálarfrøðingur ikki høvdu verið betri egnaði til tann leiklutin. Sum heild hevði samansetingin løgfrøðingur, serlækni í kvinnusjúkum, psykiatari/sálarfrøðingur og sosialráðgevi helst fevnt um fleiri av teimum táttum, sum samráðið skal taka støðu til, enn tann samansetingin verandi lógartekstur ásetur.

Tá um ræður **§ 16 í lógaruppskotinum**, so kann tað vera ein avbjóðing, at eisini hava ein lækna í kvinnusjúkum at viðgera kærur um noktandi svar í samráðnum til fosturtøku. Eins og viðmerkingarnar til lógaruppskotið vísa á, so eru tað einans 4 størv til læknar við sergrein í kvinnusjúkum í Føroyum. Tí er tað skjótt, at sambondini gerast tøtt, og tað kann vera avbjóðandi at seta spurnartekin við tað, sum starvsfelagin í samráðnum hevur sagt. Í so máta er tað gott, at ein letur upp fyri, at ein barnalækni heldur enn ein lækni við sergrein í kvinnusjúkum situr í nevndini. Tó kann ein bæði sakna grundgeving fyri, hví tað júst er ein barnalækni, og fyri hví møguleikin at tað er ein lækni við sergrein í kvinnusjúkum yvirhøvur er við í lógaruppskotinum, um ein er varugur við, at tað er ein avbjóðing, tá so fáir læknar við sergrein í kvinnusjúkum eru í Føroyum. Er tankin t.d., at talan kann vera um læknar, sum eru í starvi uttanlands, so er helst best at nevna tað í viðmerkingunum.

## Um viðmerkingarnar til lógarupsskotið

Í **1.2 í viðmerkingunum** til lógaruppskotið verður nakað gjørt burturúr, at tað kann vera vandamikið fyri heilsuna hjá kvinnum, um ólógligar og ótryggar fosturtøkur fara fram í Føroyum. Tað er eitt nú hetta lógaruppskotið skal tryggja ikki kemur fyri. Tað er tó heldur ivasamt, hvørt júst hetta er aktuelt í Føroyum. Lógaruppskotið vísir á, at tað eru dømi um kvinnur, sum ólógliga fáa sær heilivág at fremja medisinska fosturtøku, og at hetta er vandamikið fyri heilsuna hjá teimum (og kann ávirka møguleikan at fáa børn seinni), tá heilivágurin ikki verður tikin undir skipaðum umstøðum. Tó er eingin staðfesting av, hvussu vanligt hetta er, hvar vitanin um, at hetta kemur fyri í Føroyum, kemur frá, ella nøkur staðfesting av, at hetta er nakað, ein hevur sæð neiligar avleiðingar av í heilsuverkinum í Føroyum. Havandi í huga at ein undir verandi umstøðum kann velja at fara til ein lækna, sum er meira jalig/ur, og kann velja at fara uttanlands, so er tað meira ivasamt, hvussu vanligt tað er við ólógligum og ótryggum fosturtøkum í Føroyum. Ynskiligt hevði tí verið, at hetta varð betri lýst, so tað er gjørligt at meta um, hvørt tað er eitt argument grundað á veruligu støðuna í Føroyum ella ikki. Hevur ein ikki nakað próvfast grundarlag at byggja hesa útsøgnina á, so eigur hon ikki at vera við í lógaruppskotinum.

Í **1.3 í viðmerkingunum** staðfestir ein, at ynskið er at hava so fáar fosturtøkur sum gjørligt, og tí skal ein gera sum mest fyri at upplýsa og spreiða vitan um fyribyrging. Viðmerkingarnar koma seinni rættiliga ítøkiliga inn á, hvussu hetta skal gerast – serliga við at uppraðfesta seksual undirvísing nógv -, men spurningurin er, um ein ikki eisini eigur at gera meira enn bara at undirvísa. Uttanlands er tað eitt nú ikki óvanligt, at ein á støðum, har nógv ung fólk eru, hevur lætta atgongd til fyribyrging, upplýsing um fyribyrging, upplýsing um kynssjúkur, og hevur lættar hættir at støkka inn at kanna, hvørt ein eitt nú hevur kynssjúkur. Serliga um ein fær sett hetta saman við, at tað eru støð, har ung eisini hava onnur ørindi, so er tað nokk væl meira sannlíkt, at ung leita sær hjálp har, eftirsum tað minkar um sannlíkindini fyri slatri, og er ómakaleyst at støkka inn.

Hetta, at ein leggur stóran dent á seksual undirvísing fyri at minka um títtleikan av, at kvinnur óynskt gerast við barn, samsvarar tó ikki so væl við tað, ið verður staðfest í **1.4.7 í viðmerkingunum**:

*"Tað er nógv sum bendir á, at tað í Føroyum ikki eru tær heilt ungu kvinnurnar, sum fáa fosturtøku, men heldur kvinnur, sum hava familju og longu hava fingið børn."*

Tað er ógvuliga ósannlíkt, at tað er manglandi vitan um fyribyrging og avleiðingarnar av samlegu, sum ger, at kvinnur, sum hava familju og longu hava fingið børn, gerast við barn og ynskja fosturtøku. Kortini verður eisini seinni í 1.4.7 staðfest at:

*"Fyri at halda talið á fosturtøkum so lágt sum gjørligt, er tað neyðugt at flyta fokus frá forboði til upplýsing, og at fyribyrgja at kvinnur koma í ta støðu, at hon verður við barn uttan at ætla tað, og tí møguliga fer at umhugsa fosturtøku."*

Eru tað mest kvinnur, sum longu hava børn, sum ynskja at fremja fosturtøku, so er tað sum sagt ósannlíkt, at betri seksual undirvísing fer at gera nógvan mun. Tí kann ein seta spurnartekin við, hvørt tað er akkurát upplýsing og fyribyrging, ið fara at gera heilt stóra munin, tá um ræður føroysku fosturtøkutølini. Tað hevur kortini stóran týdning at raðfesta hesa vitan og kunning, men argumentatiónin júst í hesum sambandi við at minka um fosturtøkur hongur ikki so væl saman.

Summir limir vísa eisini á, at ein kann seta spurnartekin við, hvørt tað er rætt at siga, at galdandi lóggáva er ein forboðslóg.

Tá um ræður **1.4.1 í viðmerkingunum**, so verður staðfest at:

*"... Við at staðfesta, at kvinnan sjálv kann taka avgerð um fosturtøku innan eina ávísa freist, verða allar kvinnur eins fyri lógini, og hetta er eisini við til at forða fyri, at kvinnur koma illa fyri av ólógligum og ótryggum fosturtøkum uttan vegleiðing frá lækna..."*

So er hetta ikki heilt satt. Ein kann, eins og fyrr víst á, seta spurnartekin við, hvørt tað er so rætt at leggja stóran dent á hetta við ólógligum og ótryggum fosturtøkum. Men meira grundleggjandi, so er tað ikki satt, at ein staðfestir at kvinnan sjálv kann taka avgerð um fosturtøku, og allar kvinnur tí verða eins fyri lógini. Kvinnur undir 18 ár kunnu ikki taka avgerð um fosturtøku uttan samtykki frá foreldrum teirra. Tí eru tær ikki á jøvnum føti við aðrar kvinnur. Er tað so, at vandi er fyri ólógligum og ótryggum fosturtøkum í Føroyum, so verður hesin bólkurin ikki í eins stóran mun vardur. Tó kunnu tað verða aðrar góðar orsakir til, at foreldrini eru við í myndini, eins og tað fyrr er víst á. Men skal teksturin í viðmerkingini endurspegla lógartekstin, so krevst tað at hann verður broyttur nakað.

Tað verður somuleiðis staðfest at:

“*Tað kann vera við til at tryggja sjónarmiðini hjá manninum og pápanum at barninum, um hann hevur rætt til at vera hoyrdur ella til at úttala seg, áðrenn ein møgulig fosturtøka verður framd. Hinvegin er hetta í andsøgn við rættin hjá kvinnuni til sjálv at taka avgerðina og tað, sum er ført fram omanfyri. Somuleiðis kann talan vera um støður, har umstøðurnar avgerandi tala ímóti, at tað skal vera eitt krav, at maðurin ella pápin at barninum skal úttala seg*.”

Her kann ein eisini argumentera báðar vegir, eins og viðmerkingarnar sjálvar leggja upp til. Pápin eigur í prinsippinum líka stóran rætt til barnið sum kvinnan, og uttan pápan, so var einki fostur. Tí kann ein siga sum so, at tað er órættvíst, at pápin ikki hevur trygd fyri, at hann er við í avgerðini. Ein kann eisini brúka somu argument her, sum tá um ræður kvinnur undir 18 ár, at tað at pápin er við – um pápin og mamman eru sambúgvandi – tryggjar, at kvinnan fær stuðul og ikki situr púra sjálv við avgerðini. Sostatt kann ein siga, at tað hevði verið gott fyri bæði kvinnuna og mannin, um tey bæði hava trygd fyri, at tey eru við í avgerðini.

Hinvegin er hetta í andsøgn við endamálið við lógarbroytingini, at geva kvinnuni sjálvari ræði yvir sín kropp, og hvørt hon ynskir at ganga við barninum ella ikki. Tað er eitt ógvuliga stórt inntriv í rættin hjá kvinnuni, um ein sambúgvandi pápi kann nokta henni at fáa fosturtøku, og harvið tvinga hana at føða barnið. Tí kann ein eisini ógvuliga væl argumentera fyri, at um ein metir, at tað er rætt at loyva fosturtøku, so er tað eisini ein natúrlig avleiðing av tí, at tað er kvinnan sjálv, sum situr við avgerðini. Vil ein argumentera fyri, at ein sambúgvandi pápi eigur at vera við í avgerðini, og samstundis vera fyri at loyva fosturtøku upp til t.d. viku 12, so kann ein siga sum so, at einki menniskja er ein oyggj í sjálvum sær, og at vit øll óansæð verða ávirkaði av øðrum tá vit taka eina avgerð. Tá tekur kvinnan óansæð ikki avgerðina púra sjálv, og tí kann stuðulin hon fær frá at hava makan við í tilgongdini viga nakað tyngri í metingini. Vandin er tó altíð til staðar tá fyri, at maðurin í einum ósunnum parlagi kann tvinga kvinnuna at gera, sum maðurin ynskir.

Tá um ræður staðfestingina í **1.4.2 í viðmerkingunum**, at:

*"... Læknafakliga er eingin endalig niðurstøða um, nær lívið byrjar...."*

So eru tað ráðslimir, ið seta spurnartekin við hesan útsøgn. Tey vísa á, at lívfrøðiliga er neyvan nakar, sum av álvara argumenterar fyri, at eitt fostur ikki er lív. Innan lívfrøðina eru nøkur ávís krøv, sum skulu verða uppfylgd fyri at nakað er livandi. Hetta er førleikin at reagera uppá signalir (hormon osfr.), tillaga seg til umhvørvið, vaksa, mennast, og at duga at framleiða og lesa gen/DNA og protein. Allar hesar førleikar hevur fostrið og hevur havt tað síðani eggið bleiv gitið. Sostatt er greitt, sambært einum lívfrøðiligum sjónarhorni, at tað sum verður tikið við fosturtøku er ein livandi vera. Tó kann hvørki lívfrøðin ella læknafrøðin siga nakað um, hvørt hetta lívið hevur virði, tað er ein etiskur spurningur.

Aðrir ráðslimir halda ikki, at setningurin metir um, hvørt eitt fostur er lív, men heldur tosar um "lívið", og at har er ikki læknafrøðilig semja um, nær lívið hjá einum menniskja byrjar.

Tekur ein báðar pólarnar, so sigur eina fatanin, at eitt fostur ikki er eitt menniskja – ella í hvussu so er ikki hevur rættindi sum eitt menniskja – fyrrenn tað kann yvirliva sjálvstøðugt frá mammuni. Hin pólurin sigur, at frá teirri løtu ein sáðkykna og eitt egg renna saman, so er talan um eitt menniskja, ið hevur rættindi har eftir. Millum tær báðar fatanirnar er so hin meira stigvísa fatanin, ið sigur, at so hvørt sum fostrið mennist, so gerst tað meira líkt einum menniskja, og fær harvið eisini stigvíst fleiri rættindi. Sambært hesi fatan ber ikki neyvt til at siga, nær tað er, at fostrið flytur seg frá "einans" at vera eitt fostur, til at vera eitt menniskja við øllum teimum rættindum, ið menniskju hava.

Tá um ræður **1.4.3 í viðmerkingunum**, so verður eitt nú staðfest at:

*"... Í metingini av lívførinum hjá einstaka fostrinum er tað avgerandi, um verulig útlit eru til, at barnið kann yvirliva í øllum førum í nakrar vikur, um tað varð føtt, tá ið inntrivið annars var ætlað. Um so er, verður mett, at fostrið er lívført...."*

Ein kann seta spurnartekin við, hvørt tað, at eitt barn er ført at yvirliva í "nakrar vikur", er ein nóg góð orsøk í sjálvum sær, at meta at fostrið er lívført. Ein kann argumentera fyri, at um tær vikurnar (ella mánaðirnir), barnið kann haldast á lívi, eru merkt av ógvusligari pínu og líðing, so er tað ivasamt, um tað er eitt lív, sum tað er vert at bjóða einum barni. Sambært hesum sjónarhorninum er tað tí rættast at loyva fosturtøku, eisini um eitt barn tekniskt sæð er lívført, men bara fer at uppliva pínu. Hinvegin ber tað eisini ógvuliga væl til at argumentera fyri, at sjálvt um eitt barn upplivir sterka pínu og líðing, so kunnu bæði barnið og foreldrini finna onnur virði í tí, at barnið verður borið í heim og er livandi. Sambært hesum sjónarhorninum er tað so at siga ógjørligt hjá menniskjum at døma um, nær eitt lív er vert at liva og ikki, og hevði tað tí verið at átikið sær størri vald, enn ein eigur at hava, at seta seg til dómara yvir, nær eitt lívført barn eigur at sleppa at liva og ikki.

Í **1.4.4 í viðmerkingunum** verður staðfest um kvinnur undir 18 ár at:

*"Eitt krav um, at tann ella tey, sum hava foreldramyndugleika skulu geva samtykki til eina fosturtøku, er við til at skapa eina stuðlandi og vegleiðandi rammu um gentuna ella ta ungu kvinnuna og møguliga lætta um avgerðartilgongdina. Hetta er eisini við til at tryggja og verja vælveruna hjá gentuni ella tí ungu kvinnuni."*

Ein kann heldur lættliga seta spurnartekin við hesa útsøgnina. Eins og tað fyrr er víst á, so er tað sannlíkt, at um unga kvinnan og foreldrini hava eitt samband, har tey kunnu skapa eina stuðlandi og vegleiðandi rammu fyri barn teirra, so fortelur unga kvinnan teimum óansæð, at hon er við barn og umhugsar fosturtøku. Følir unga kvinnan seg ikki trygga at fortelja foreldrum sínum hetta, so eru tað nokk hampilig sannlíkindi fyri, at hon fer at fáa eina minni stuðlandi reaktión frá foreldrum sínum, um tey fáa tað at vita. Hinvegin kann ein eisini siga sum so, at tannáringar ofta rokna við, at foreldrini reagera ógvusligari, enn tey gera, um har er eitthvørt tannáringarnir eru bangnir fyri, at foreldrini skulu fáa at vita, og tí kann tað vera gott at tvinga barnið at tosa við foreldrini. Ein kann eisini siga sum so, at vanliga eru tað foreldrini, sum lofta, hjálpa og stuðla børnum sínum, eisini tá tey eru eldri enn 15 ár, og tí er tað gott at tryggja, at foreldrini eru við sum eitt trygdarnet frá byrjan av.

Meira grundleggjandi kann ein seta spurnartekin við hvørt tað er rætt, at foreldur skulu geva samtykki. Spurningurin er, um ein ikki heldur skal eggja til, at tey skulu kunnast um hetta, enn at tey skulu samtykkja, um ynskið er, at tey skulu vera tøk at stuðla ungu kvinnuni. Hava tey avgerðarrætt, so kann ein ung kvinna lættliga føla seg meira trýsta enn neyðugt, og tað kann vera ein rættiliga ógvuslig uppliving, um t.d. unga kvinnan hevur eitt sterkt ynski um fosturtøku, og foreldrini siga nei. Ein tílík støða kann lættliga oyðileggja sambandið unga kvinnan hevur við foreldur síni. Situr unga kvinnan mest og fokuserar uppá, at sannføra foreldrini um at siga ja ella er bangin fyri, hvat tey skulu siga, so eru tað heldur ikki bestu fortreytirnar fyri, at sambandið við foreldrini er ein stuðul og lættir um hjá ungu kvinnuni. Ein kann tí argumentera fyri, at tað at foreldrini hava avgerðarrætt kann virka ímóti tí, sum viðmerkingarnar siga er endamálið hesi ásetingini, at skapa ein stuðlandi og vegleiðandi rammu um gentuna.

Sostatt er tað alt í alt rættiliga greitt, at hesin spurningurin eigur at viðgerast meira kritiskt, enn tað ein sær í lógaruppskotinum og viðmerkingunum.

Hyggja vit at viðmerkingunum til **stk. 1, nr. 3. Barnið álvarsliga sjúkt í móðurlívi**, so sigur eina orðingin:

*"Loyvi kann verða givið til fosturtøku av sonevndum eugeniskum (ættarrøktarligum) orsøkum. Tað er um vandi er fyri, at barnið orsakað av ættarbregði, sjúku ella skaða í móðurlívi fær álvarslig sálarlig ella likamlig brek ella sjúku."*

So kann tað vera óheppið, at brúka júst orðið “eugeniskum (ættarrøktarligum)” í hesum sambandi. Orðið hevur ein øgiliga ítøkiligan, øgiliga neiligan týdning, ið fevnir um rættiliga nógv meira umfevnandi sortering av fostrum, enn tað, sum næsti setningurin nágreinar, at talan er um. Orðið er væl og virðiliga knýtt at nógvum av myrkastu og daprastu tíðarbilunum í 20. øld, og tann fatan av menniskjum og at skapa “fullgjørda yvirmenniskja”, er neyvan nakað, sum ein ynskir er umboðað í føroyskari lóggávu. Tulkar ein orðið út frá søguliga týdninginum, so letur tað eisini upp fyri, at ein tulkar nágreinandi setningin breiðari, enn ætlanin sannlíkt er, at hann skal verða tulkaður. Serliga um ein setur hetta saman við møguleikanum, at tulka næstu viðmerkingarnar breitt, so kann ein enda inni í, at orðingin letur upp fyri, at ein førkar seg yvir í eitt selektiónssamfelag, har fólk við ávísum brekum og sjúkum ikki hava sama virði sum onnur, og tí kunnu veljast frá.

Næstu tvey reglubrotini eftir hetta, eru eisini heldur óneyvt orðaði:

*“Tað er ikki ein treyt, at talan altíð skal vera um ein nærliggjandi vanda fyri álvarsligari sjúku. Hvussu stórur vandin skal vera fyri, at loyvi til fosturtøku kann verða givið, veldst um hvønn vanda talan er um. Er talan um sera álvarslig brek ella sera álvarsliga sjúk eiga ov stór krøv ikki at vera sett til vandan, meðan hinvegin minni álvarslig brek ella sjúka bara kunnu grunda eina fosturtøku, um talan er um rættiliga stóran vanda.*

*Viðurskifti, sum ikki eru ein vandi fyri virkið hjá fostrinum seinni í lívinum, er sostatt sum meginregla ikki grundarlag fyri at gera loyvi til fosturtøku.”*

Serliga setningurin “*minni álvarslig brek ella sjúka*” letur upp fyri, at tað er ræðuliga vítt, hvat ein fær undantak til fosturtøku til eftir viku 12. Tann setningurin saman við setninginum um álvarslig brek og sjúku, sigur í prinsippinum, at ein kann fáa fosturtøku eftir viku 12, bara ein er vísur í, at fostrið hevur brek ella sjúku. Eitthvørt brek og einhvør sjúka, sum ikki er álvarslig, er minni álvarslig. Tí kann setningurin tulkast sum, at hann fevnir um øll brek og allar sjúkur. Serliga havandi í huga, at ein í Føroyum hevur ein høgan títtleika av ávísum sjúkum og brekum, so kann ein møguleiki fyri at tulka lógina so breitt vera sera óheppin. Ein kann eisini seta spurnartekin við, hvørt hetta letur upp fyri diskriminatión av ávísum bólkum í samfelagnum.

Næsta brotið við viðurskiftum, “*sum ikki eru ein vandi fyri virkið hjá fostrinum seinni í lívinum*”, er heldur ikki nóg neyvur til at avmarka hetta – serliga tá tað kemur aftaná eina so ógvuliga breiða nágreining. Eitthvørt brek og einhvør sjúka kann vera ein vandi fyri virkið seinni í lívinum. Tað kann avmarka starvsmøguleikar, avmarka luttøku í ítrótti, økja vandan fyri sjúku og pínu... har eru so øgiliga nógv brek og øgiliga nógvar sjúkur, ið sum so ikki eru álvarslig, men avgjørt kunnu vera ein “vandi” fyri virkið hjá fostrinum seinni í lívinum, tó at fostrið uttan víðari kann fáa eitt langt og gott lív á jøvnum føti við onnur,

sær ein burtur frá teimum ítøkiligu tingunum brekið ella sjúkan ávirka. Spurningurin er eisini, hvat ein ger við øllum teimum brekum og sjúkum, sum ikki eru sera álvarslig, men avgjørt kunnu avmarka fólk nógv. Sær ein t.d. at fostrið fær trupulleikar við at ganga, sjónin er ring, ella ein fær gikt, merkir tað so, at hetta er ein haldgóð orsøk til fosturtøku? Hvussu um tað eru degenerativar sjúkur, har støðan spakuliga gerst verri yvir nøkur áratíggju?

Í hesum brotinum eru viðmerkingarnar ov óneyvar, og mugu nágreinast betri. Sum tær eru orðaðar nú, so er tað ógvuliga lætt at tulka tær munandi breiðari, enn tað, sum helst er ætlanin. Tó skal sigast, at tað ikki eru øll í ráðnum, sum halda at viðmerkingarnar kunnu tulkast so breitt, men júst tað at ósemja er um tulkingina kann eisini sigast at vera eitt argument fyri, at viðmerkingarnar eiga at vera neyvari.

Meira yvirskipað takkar Etiska ráðið fyri møguleikan við hesum hoyringssvari at viðmerkja uppskotið um nýggja fosturtøkulóg. Etiska ráðið hevur, sambært heimilandi lóggávu "til endamáls at fremja og styrkja kjak og vitan um etiskar spurningar, ið knýta seg til heilsufakligt virksemi á heilsuøkinum, almannaøkinum og kommunala økinum". Etiska ráðið varð eisini boðið á fund á Løgmálaráðnum, tá ið upprunaliga varð arbeitt við lógaruppskotinum. Summir limir í Etiska ráðnum undrast tó, at tað í lógaruppskotinum sjálvum og í viðmerkingunum lítil og eingin ábending er um, at hædd hevur verið tikin fyri etisku argumentini ímóti fosturtøku. Teir seta tí spurnartekin við, hvat endamálið er við at bjóða umboðum fyri m.a. Etiska ráðnum á fund at vísa á argument ímóti fosturtøku, men síðani púra síggja burtur frá tí, teir hava víst á. Fosturtøka er eitt mál, sum stór etisk ósemja er um. Og fosturtøka er eitt mál, sum føroyingar sínamillum eisini eru sera ósamdir um. Áðurnevndu limir í Etiska ráðnum meta tað vera átaluvert, at so lítið sæst til veruligar etiskar ósemjur í lógaruppskotinum og at ikki verður greitt frá, hví hesar ósemjur ikki verða viðurkendar.

## Samanumtikið

Etiska ráðið tekur ikki støðu til, hvørt lógaruppskotið eigur at samtykkjast ella ikki. Í ráðnum eru fólk, ið eru fyri at loyva fosturtøku upp til viku 12, eins og tað eru fólk í ráðnum, sum eru ímóti at loyva fosturtøku. Hyggja vit at kjakinum um fosturtøku sum heild, so hava bæði tey, sum eru ímóti at loyva fosturtøku upp til viku 12 og tey, sum eru fyri at loyva fosturtøku upp til viku 12, góð og væl grundaði argument. Tað er torført at síggja, hvussu ein skal finna semju, tá fortreytirnar fyri argumentunum eru so grundleggjandi ymisk.

Tó eru tað fleiri av tættunum í lógaruppskotinum, sum væl kunnu viðgerast nærri og í størri mun kunnu problematiserast. Tað hevði verið ynskiligt, um ein grundgav betri fyri fleiri av ásetingunum í lógini, eins og um ein í nøkrum av førunum ger meira burturúr, at eisini lýsa tær møguliga neiligu avleiðingarnar av tí, sum lógin ásetur.

Vegna Etiska ráðið

Bergur Debes Joensen, formaður

Regin Berg, fakligur skrivari